# Rættur rockur frá ruk

**Konsertin við The Rolling Stones í Horsens sunnukvøldið gjørdist ein staðfesting av, at rockabbarnir ikki loyva nøkrum at ivast í, at teir framvegis duga, orka og eru á odda í kapprenningini um at vera heimsins fremsti rockbólkur. 85.000 fólk savnaðust á Forum Horsens og gjørdust vitni til eina framúr góða konsert við teimum størstu, ið hesaferð kanska vóru á palli síðstu ferð**



Konsertin sunnukvøldið var framúr. Pallurin var sum eitt háhús at síggja. 62x25 metrar og palltornini eru 27 metrar høg

» *Neyvan nakar føroyskur seyðamaður í tríatiárunum hevði orkað at fylgt Mick Jagger og rópt "sirri, sirri sirri"!!*

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: D.Olsen*

The Rolling Stones endaðu sunnukvøldið heimsferðina, ið hevur heitið A Bigger Bang. Ferðin byrjaði í 2005 og hevur sett met sum tónleikaheimsferðin í ár, ið hevur vunnið mestan pening. Í hølunum koma Robbie Wiliams og U2, men Stones eru á odda.

Stóri endabresturin fór fram á Forum Horsens, sum í gerandisdegnum er karmur um 8 venjingarvallir hjá AC Horsens. Og tað skuldu eisini heili 85.000 fólk til at fylla økið, men tað var ongin trupulleiki, tí tað vóru jú Stones, ið fóru á pall.

Teir hava síðani byrjan í 1962 verið á 31 heimsferðum. Hvørt talan verður um fleiri, er ilt at siga. Keith Richards sigst vera ótroyttiligur og er hann ikki á palli, so veit hann ikki, hvat hann skal fáa tíðina at ganga við. Saman við Mick Jagger er hann skapandi drívmegin í bólkinum og teir báðir skúlavinirnir stovnaðu eisini bólkin í 1962. Teir eru nú 63 ára gamlir. Afturat sær hava teir Ron Wood, 58 ár, og aldursforsetan Charlie Watts, 64 ár, ið nú sigst vera troyttur av lívinum við áralongum ferðum.

Hesir eru grundstamman í bólkinum, men afturat teimum eru onnur á palli.

Men kjak og gitingar um, at seinasta heimsferð, seinasta pallframførslan, hevur verið er næstan líka gamalt, sum bólkurin sjálvur. So tá konsertin endaði sunnukvøldið, og punktum varð sett fyri hesi heimsferðini, so tordi ongin at staðfesta, at hesir gomlu gubbarnir ikki aftur trína á pall, hóast tað kom fram í nøkrum umrøðum, men nógv spalturúm fáa hesar gitingar ikki longur.

Og tað er vælskiljandi.

## Jagger og seyðamenn

Rolling Stones prógvaði seg sum ein bólk, ið er í toppformi. Og skal ein nevna Mick Jagger, so er formurin í hvussu er júst sum hann skal, hóast eitt lív, ið hevur styrkt ímyndina av "sex, drugs and rock'n roll".

63 ára gamli Mick Jagger joggaði allan pallin – teir 100 metrarnar hvønn veg - aftur og fram og upp og niður, meðan hann sang, sum var tað fyrsta dagin. Hann sang í grundini væl, hóast avlýstar konsertir í Spaniu fyri stuttum vegna hálsbruna.

Aftur og fram dansaði Jagger, meðan hann risti við afturpartinum og gapandi rætti armarnar út móti fjøldini, meðan hann sang um Satisfaction og Jumpin' Jack Flash.

Neyvan nakar føroyskur seyðamaður í tríatiárunum hevði orkað at fylgt Mick Jagger og rópt "sirri, sirri sirri"!!

## Heimssøga

At standa í Horsens og síggja og hoyra Stones, er sum at skriva seg inn í heimssøguna. Hesa kensluna fær ein.

Vakrir eru teir, Keith og Mick, ikki at hyggja at. Rukkutir og skrámutir. Keith sum ein mumia, gjørd úr gummi, og Mick skrámutur sum turkaður steinbítur. Men sjarmuna hava teir!! Og orkuna!! Og teir duga!!

Teir hava dugað at skriva stóru rock-klassikararnar og teir duga væl at framføra teir. Mick er fantastiskur á palli. Har er samband út um pallkantin og aftur til áhoyrara nummar 85.000 beinanvegin.

Fullir av orku sjarmera teir seg inn í hjørtuni á áhoyrarunum.

Sum ein danskur ummælari seinni skrivaði, so sendi ein kvinna síðst í fýratiárunum manni sínum, fyrst í fimtiárunum, eygnabrá sum søgdu, at hasar rørslurnar, sum Mick sýndi á pallinum, hevði hon ikki sæð frá manni sínum; hvørki nú ella áður. Og óivað fingu mangir menn eitt skot frá konum sínum.

Størur partur av lurtarafjøldini var tilkomið fólk á aldur við menninar á pallinum, men tað vóru eisini tey, ið komu við eitt sindur seinni og tey heilt ungu, sum tó munnu hava havt koyrikort í eini 5 – 10 ár.

Fjøldin kann óivað býtast í 3 partar; Tey, ið so at siga fingu Stones inn við móðurmjølkini ella fyrstu ølini, meðan ungu tónleikararnir spældu á svart/hvítum sjónvarpsskíggja. Ella tey, ið komu við eitt sindur seinni, í sjeytiárunum, tá mytan um rullisteinarnar var vaksin – hesar menn, sum livdu rocklívið á tamb, men ikki tóktust at nervast av tí, annað enn at skinnið sá alt meira garvað út. Og so tey, sum komu við seinni, kanska í 80'unum ella fyrst í 90'unum. Kanska tí tey spældu plátur hjá foreldrum sínum, ella tí tey royndu seg sum rockarar í onkrum bilhúsabólki, har løg sum Honky Tonk Women ofta leggja støðið. Ella bara tí tey elska rocktónleik. Í øllum førum ein blandað fjøld, ið helst fevndi frá 20 árum og heilt upp til 70 ár, ella meira.

Ein fjøld, ið kom úr øllum hugsandi ættum. Bæði danir, føroyingar, og fjepparar úr Noreg, Íslandi og Svøríki og kanska aðrastaðni við.

At seta seg í tokið úr Keypmannahavan og koyra til Horsens við tí í huga, at ein er ávegis til nakað heilt serstakt, er ein løgin kensla. Sjálvandi er vandin har fyri, at Stones eru ov gamlir, ikki orka ella tíma meira, eftir eitt ár, ella meira, á palli í eitt koyr.

Og eftir at Madonna fekk harðar ákoyringar frá ummælarunum eftir sína konsert í Horsens fyri stuttum, so spøktu slíkar hugsanir. Og eisini tí at Stones í helmingin av tíðini, teir hava verið til, hava verið spáddir at vera komnir til endan á leiðini. Men hvørjaferð hava enn fleiri kilometrar ligið framman stavn.

## Stórt

Konsertin sunnukvøldið var